# Býráðsfundur 25.11.2024

**<u>Býráðsfundur 25.11.2024 kl. 18.00</u>**

Fundarstað: Fundarhølið

| | | |
|---|---|---|
| Hjástødd: | Súni í Hjøllum, borgarstjóri | x |
| | Heini S. Kristiansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Jan Højgaard | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Rannvá í Túni Petersen | x |
| | Elsbet E. Magnussen, skrivari | x |

**<u>Mál til viðgerðar:</u>**

| | |
|---|---|
| Mál nr. 89/2024 – Áskoðaraskýli á Svangaskarði | ALMENT |
| Mál nr. 90/2024 – Fíggjarætlan 2025 hjá Nes kommunu, 2. viðgerð | ALMENT |
| Mál nr. 91/2024 – Eykajáttanir 2024, 1 viðgerð | ALMENT |
| Mál nr. 92/2024 – Býráðsfundir og nevndarvikur í 2025 | ALMENT |
| Mál nr. 93/2024 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 94/2024 – | AFTURLATIÐ |

*Borgarsjórin bað um loyvi at seta eitt eyka mál á skrá:*

Mál nr. 95/2024 – Nýggj høvuðs EL-talva á Svangaskarði ALMENT

**<u>Mál nr. 89/2024 – Áskoðaraskýli á Svangaskarði ALMENT</u>**

<u>J.nr.: 2006-13-2024</u>

Nes kommuna hevur fingið tilboð uppá nýtt áskoðaraskýli á Svangaskarði. Talan er um tvey skýli, eitt niðanfyri, og eitt omanfyri verandi ítróttarhús.
Krøv frá FSF áseta, at skýli við 300 áskoðaraplássum undir taki mugu vera, um vøllurin framhaldandi skal verða góðkendur til dystir í bestu deildini.

Lisitatión var á kommunuskrivstovuni tann 22.10.2024, og boð komu frá KBH og Sp/F Búð. Skákið var eisini boðið til lisitatión, men góvu einki boð.

KBH hevði lægra tilboðið á  kr 5.370.842
Teknistovan í Gøtu mælir til at taka av tilboðnum frá KBH.

Hartil kemur kostnaður fyri tilfar til stálkonstruktiónina, kostnaður til óvæntaðar útreiðslur og ráðgevarakostnaður og eftirlit. So er eisini at siga, at væntandi fæst stuðul frá FSF á kr. 600.000. Væntandi verður kostnaðurin tí íalt útvið kr. 7.000.000 netto.
Í FÆ 2024 eru avsettar kr. 4.700.000 til áskoðaraskýlið.

**Á fundi, tann 19.11.2024, mælir Tekniska nevnd til at taka av tilboðnum frá KBH og at gera bæði skýlini.**

**Á fundi, tann 19.11.2024, mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við Teknisku nevnd, og at fíggingin á kr. 2.300.000 verður tikin við á Fíggjarætlanini 2025 2. viðgerð.**

**Tilmælini hjá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Mál nr. 90/2024 – Fíggjarætlan 2025 hjá Nes kommunu, 2. viðgerð ALMENT**
J.nr.: 1107-5-2024

**Uppskot til fíggjarætlan fyri 2025 hjá Nes kommunu**

| | | **2025** | | **2024 v/eykaj.** | | **Munur** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| §20 Kommunuskattur | tkr. | 68.384 | tkr. | 64.256 | tkr. | 4.892 |
| §20 Húsaleiguskattur | tkr. | 15 | tkr. | 5 | tkr. | 10 |
| §20 Felagsskattur | tkr. | 1.800 | tkr. | 1.500 | tkr. | 300 |
| §20 Eftirlønargjøld | tkr. | 15.077 | tkr. | 13.530 | tkr. | 1.435 |
| § 20 Tøkugjald | tkr. | 15 | tkr. | 0 | tkr. | 15 |
| §20 DIS, FAS  v.m. | tkr. | 2.885 | tkr. | 2.770 | tkr. | 106 |
| **Inntøkur í alt** | **tkr.** | **88.176** | **tkr.** | **82.062** | **tkr.** | **6.114** |
| | | | | | | |
| §1 Kommunal Fyrisiting | tkr. | 8.368 | tkr. | 7.491 | tkr. | 918 |
| §2 Almanna- og heilsumál | tkr. | 28.509 | tkr. | 26.009 | tkr. | 2.500 |
| §3 Børn og ung | tkr. | 15.699 | tkr. | 15.977 | tkr. | -470 |
| §4 Undirvísing | tkr. | 5.400 | tkr. | 5.129 | tkr. | 271 |
| §5 Mentan og frítíð | tkr. | 6.078 | tkr. | 6.974 | tkr. | -896 |
| §6 Teknisk mál | tkr. | 8.619 | tkr. | 7.370 | tkr. | 1.249 |
| §7 Kommunal virki | tkr. | 3.792 | tkr. | 3.885 | tkr. | -134 |

# Býráðsfundur 25.11.2024

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstur í alt** | **tkr.** | **76.465** | **tkr.** | **73.027** | **tkr.** | **3.438** |
| | | | | | | |
| **Úrslit áðrenn fíggjarkostnað og íløgur** | **tkr.** | **12.099** | **tkr.** | **9.035** | **tkr.** | **2.676** |
| | | | | | | |
| §20 Rentustuðul | tkr. | 1.850 | tkr. | 1.800 | tkr. | 50 |
| §20 Rentuútreiðslur | tkr. | 1.400 | tkr. | 1.091 | tkr. | 309 |
| **Fíggjarkostnaður í alt** | **tkr.** | **3.250** | **tkr.** | **2.891** | **tkr.** | **359** |
| | | | | | | |
| **Úrslit áðrenn íløgur** | **tkr.** | **8.549** | **tkr.** | **6.144** | **tkr.** | **2.317** |
| | | | | | | |
| §1 Kommunal Fyrisiting | tkr. | 0 | tkr. | 0 | tkr. | 0 |
| §2 Almanna- og heilsumál | tkr. | 225 | tkr. | 47 | tkr. | 178 |
| §3 Børn og ung | tkr. | 1.700 | tkr. | 1.320 | tkr. | 380 |
| §4 Undirvísing | tkr. | 720 | tkr. | 3.400 | tkr. | -2.680 |
| §5 Mentan og frítíð | tkr. | 7.616 | tkr. | 3.840 | tkr. | 1.476 |
| §6 Teknisk mál | tkr. | 1.654 | tkr. | 8.461 | tkr. | -6.807 |
| §7 Kommunal virki | tkr. | 4.837 | tkr. | 6.496 | tkr. | -1.659 |
| **Íløgur í alt** | **tkr.** | **16.752** | **tkr.** | **23.564** | **tkr.** | **-6.812** |
| | | | | | | |
| **Úrslit í alt** | **tkr.** | **-8.291** | **tkr.** | **-17.421** | **tkr.** | **-9.129** |

**Fyritreytir og viðmerkingar til tølini omanfyri**

- Skattaprosentið er sett óbroytt til 20,5%.
- Barnafrádrátturin er hækkaður frá kr. 6.000 kr. til 7.000.
- Skattainntøkan er sett eftir framskriving av skattatølum frá Gjaldstovuni heldur enn eftir meting frá TAKS.
- Eftirlønargjøldini og DIS, FAS v.m. er sett eftir meting frá FMR.

- Ansingargjøldini eru eins og undanfarna ár kr. 2.200, kr. 1.900 og kr. 1.000.
- Øll havnagjøld og onnur gjøld eru eins og undanfarna ár.
- Leigugjald fyri leigu á havnaøkinum er hækkað 5 kr./fermetur.
- Avdráttir í árinum eru 2.910 tkr. og lántøkan er 11.201 tkr. Tað merkir, at lántøkan netto er 8.291 tkr.

**Á fundi, tann 19.11.2024 mælir Fíggjarnevndin til við 2. viðgerð, at skattaprosentið verður óbroytt 20,5%, og at barnafrádrátturin verður hækkaður frá kr. 6.000 til kr. 7.000.**

**Tilmælið varð einmælt samtykt.**

**Á fundi, tann 19.11.2024, mælir Fíggjarnevndin til við 2. viðgerð, at taka undir við 2. viðgerð av fíggjarætlanini fyri 2025, so sum ásett omanfyri.**

**Tilmælið varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 91/2024 – Eykajáttanir 2024, 1. viðgerð ALMENT**
J.nr.: 1107-2-2023

Fyrisitingin mælir til fylgjandi broytinginar á fíggjarætlanini fyri 2024:

**Rakstur tkr.**
§1 Kommunal Fyrisiting 209
§2 Almanna- & Heilsumál 0
§3 Børn & Ung 0
§4 Undirvísing 0
§5 Mentan & Frítíð 55
§6 Teknisk mál 0
§7 Kommunal virki -60

*Rakstur í alt 204*
*Rentustuðul og rentuútr. 0*
*Reguleringar í alt áðrenn íløgur 204*

**Íløgur**
§1 Kommunal fyrisiting 0
§2 Almanna- & Heilsumál 0
§3 Børn og ung 0
§4 Fólkaskúlin 0
§5 Mentan og Frítíð 532
§6 Teknisk mál 0
§7 Kommunalt virki 0
Íløgur í alt 532

**Rakstur og íløgur tilsamans 736 tkr.**

**Á fundi, tann 19.11.2024, mælir Fíggjarnevndin til, at taka undir við eykajáttanunum sum nevndar omanfyri og at játta eina meirfígging á kr. 736.000, sum verður fíggjað við innistandandi.**

**Tilmælið varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 92/2024 – Býráðsfundir og nevndarvikur í 2025** **ALMENT**

J.nr.: 1101-65-2024

| **Býráðsfundir** | **Fundarvikur** |
|---|---|
| 27. januar | vika 3 og 4 |
| 24. februar | vika 7 og 8 |
| 31. mars | vika 12 og 13 |
| 24. apríl | vika 15 og 17 |
| 26. mai | vika 20 og 21 |
| 23. juni | vika 24 og 25 |
| 25. august | vika 33 og 34 |
| 29. september | vika 38 og 39 |
| 27. oktober | vika 42 og 43 |
| 24. november | vika 46 og 47 |

**Á fundi, tann 19.11.2024, mælir Fíggjarnevndin til at býráðsfundir og fundarvikur í 2025 verða sum ásett omanfyri.**

**Tilmælið varð einmælt samtykt.**

.

**Mál nr. 95/2024 – Nýggj høvuðstalva til ítróttarhúsið á Svangaskarði** **ALMENT**

J.nr.: 1207-5-2024

*Borgarstjórin fekk loyvi at seta mál nr. 95 á skrá.*

Í samband við at nógvar dagføringar hava verið í B68 húsinum síðstu árini, er umfatandi meirnýtsla av streymi kravd á staðnum. T.d. eru nýggj og munandi máttmiklari vallarljós sett upp, og ætlanin er eisini at byggja eitt nýtt áskoðaraskýli á Svangaskarði.

# Býráðsfundur 25.11.2024

Verandi høvuðs EL-talva í B68 húsinum veitir streym til alt virksemið, ið er tengt at ovaravølli á Svangaskarði. Í samband við gjøgnumgongd av áðurnevndu arbeiðum, hevur Jóhan Magnus Gunrim (SMJ) gjørt kommununa varðuga við, at høvuðstalvan ikki lýkur dagsins galdandi treytir til slíkar talvur.

Í samskifti millum Tekniska leiðaran og SMJ, sendi SMJ, eftir áheitan frá kommununi, eina kostnaðarmeting, tann 20.07.2024, uppá at skifta verandi høvuðs EL-talvu út, og gera eina nýggja, ið lýkur ásetingarnar.

Arbeiðið at prosjektera talvuna er liðugt, og HD-Electric hevur fingið útbjóðingartilfarið. HD-Electric metir at arbeiðið kostar ímillum kr. 300.000 og 350.000. Fullfíggjað tilboð verður væntandi latið kommununi áðrenn komandi býráðsfund.

**Á fundi, tann 19.11.2024, mælir Tekniska nevnd til, at tekniski leiðarin skundar undir at fáa tilboðið inn til komandi býráðsfund.**

Tann 25.11.2024 kom tilboðið frá HD-Electric.
Tó skal havast í huga, at eitt filtur til talvuna má útvegast umframt, men sambært ráðgevanum skal endalig støða takast til filturið í 2025, tá talvan er sett upp.
Tilboð frá SMJ er komið uppá ráðgevarakostnað.

Samlaði kostnaðurin uppá høvuðs EL-talvuna verður sostatt kr. 321.725 v/6,25% mvg. Avsettar eru kr. 357.000 til endamálið í 2024 og 2025.

**Býráðið samtykti einmælt at taka av tilboðnum frá HD-Electric og SMJ á tilsamans kr. 321.725 v/6,25% mvg.**